# Miðnámsskúli í Hovi og røktarheim í Vági um trý ár

**– Tað er heilt nógv sum talar fyri at byggja miðnámsskúla og heilsuskúla í Hovi og at byggja røktarheim í Vági. Alt arbeiðið kann vera liðugt í 2007, sigur landsstýrið**



*Soleiðis hugsar Leivur Nygaard á Tvøroyri sær, at eitt røktarheim kann síggja út á stykkinum vesturi á Vatninum í Vági, sum er grivið út til miðnámsskúlan. Tað hevur annars verið ført fram, at grundstykkið vesturi á Vatninum í Vági kann bara brúkast til ætlaða miðnámsskúlan og at tað tí ikki er pláss fyri einum røktarheimi har*

MIÐNÁMSSKÚLI OG RØKTARHEIM

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Landsstýrið stendur fast við ætlanina at flyta ætlaða miðnámsskúlan í Vági til Hovs og at byggja hann í ein skúladpil har, saman við heilsuskúlanum.

Samstundis skal røktarheim byggjast í Vági.

Tað hevur landsstýrið nú gjørt øllum kommununum í Suðuroynni greitt.

Samstundis vónar landsstýrið, at kommunurnar í Suðuroy taka undir við ætlanini, so at hon kann fremjast í verki.

– Hetta hevur so nógar fyrimunir við sær, at tað vigar væl og virðiliga upp ímóti tí, at miðnámsskúlin í Suðuroy verður seinkaður eitt sindur og kanska ikki kann takast í nýtslu fyrrenn eitt ár seinni enn ætlað.

Í hesum sambandi skal viðmerkjast, at eftir ætlan skal miðnámsskúlin í Suðuroy verða liðugur í 2006.

Eftir nýggju ætlanini hjá landsstýrinum verður hann kanska ikki liðugur fyrrenn í 2007 í staðin.

Landssyrið sigur, at endamálið við nýggju ætlanini er at røkka fleiri endamálum í einum, sum øll eru til stóran frama fyri Suðuroy.

Í fyrsta lagi er tað nógv rationellari at byggja miðnámsskúlan og heilsuskúlan saman mitt í oynni, heldur enn at byggja tveir skúlar í hvør sínum enda í oynni.

Í øðrum lagi ber ætlanin í sær, at alstóri tørvurin á røktarheimsplássum í Suðuroy verður nøktaður við at byggja eitt miðalstórt røktarheim í Vági. Hetta fer samstundis at verða eitt stórt arbeiðspláss við støðugum arbeiði, serliga til kvinnur.

Og í triðja lagi er talan um eina stóra verkætlan, sum verður sera arbeiðskrevjandi og fer at verða eitt rættiligt lyft fyri handverks- og aðra vinnu í Suðuroy, nú arbeiðsloysið veksur skjótt.

### Nógv talar fyri

Landsstýrið sigur, at miðnámsskúlin í Vági fer at kosta 45 milliónir. Ætlanin er nú komin so langt, at útgrevstur og planering eru liðug, og klárt er at bjóða út.

Almanna- og heilsuskúlin á Tvøroyri, virkar undir sera trongum umstøðum, og tí er neyðugt at fara undir at fyrireika at byggja skúla har sum skjótast. Hesin skúli kann lættliga fara at kosta einar 20-25 milliónir.

Landsstýrið vísur á, at fólkagrundarlagið í Suðuroy er ikki so stórt. Samstundis er tað órationelt at byggja tveir skúlar, sum annars kundu havt so nógv til felags.

– Tí hevur samgongan og landsstýrismaðurin í skúlamálum kent tað sum sína skyldu at taka málið upp av nýggjum og veruliga at viðgera, um ikki tað einasta rætta er at leggja skúlarnar saman, siga landsstýrismenninir Jógvan á Lakjuni og Hans Pauli Strøm við kommunurnar í Suðuroy.

Og teir leggja afturat:

– Tað eru sera nógv argument fyri at byggja skúlarnar saman, tí talan er um tveir miðnámsskúlar, sum eru smáir og tí gerast lutfalsliga sera kostnaðarmiklir hvør sær.

– Verða skúlarnir lagdir saman, verða teir sjálvandi nógv bíligari tilsamans og rakstrarliga kunnu teir vera felags um nógv. Fyri tað fyrsta verður bert ein fyrisitingarlig leiðsla og ein umsiting. Og síðani kunnu vit nevna felags kantinu, bókasavn og pedagogiskan verkstað, uppihaldsrúm, samkomuhøll, kunningartøkni, húsavørð, teir kunnu brúka lærarar hvør hjá øðrum, o.s.fr.

– Hesin samanlagdi skúin kann gerast ein mentanardepil og við sínum savnandi umhvørvi kann hann vera við til at samansjóða alla Suðuroynna. Og samanumtikið verður hann á allan hátt eitt nógv betri skúlatilboð og meira lokkandi fyri ungdómin, fyrst og fremst í Suðuroy, men eisini aðrastaðni í Føroyum, siga teir báðir landsstýrismenninir.

### Suðuroy í serligari støðu

Annars vísir landdstýrið á, at í eldraálitinum frá 2002 stendur, at í Suðuroyð er tørvur á til 42 stovnsplássum til eldri. Av teimum er tørvur á 36 plássum á røktarheimi, harí til minnisveik. Síðani er tørvurin neyvan minkaður.

Tí skjýtur landsstýrið upp at gera eitt røktarheim í Vági til 35 búfólk, og av hesum kunnu tey 15 búplássini vera til minnisveik. Eitt slíkt heim verður innrættað við búfólkarúmum, felagsrúmum, matstovu, virksemissrúmum, samkomuhøll, gestarúmum, ergoterapi, fysioterapi, læknarúmi, fótarøkt, hárfríðkan, køkur, vaskarí, starvsfólkarúmum, reingerðarrúmum o.s.f.r

Tað verður mett at kosta 13,5 milliónir um árið í lønum at reka eitt slíkt heim, umframt 2,5 milliónir til annan rakstur.

– Starvsfólkatalið verður mett til stívliga 28 ársverk. Hetta kann vera eini 33 til 38 fólk, av tí at nógv av røktarstarvsfólkunum vanliga arbeiða 1/2 ella 3/4 tíð.

Vanliga kostar eitt slíkt heima eina millión fyri hvørt búfólk at byggja.

Sostatt fer eitt slíktheim at kosta 35 milliónir, men verður kostnaðurin fyri útgrevstur og planering, sum longu er gjørt, drigin frá, er íløgukostnaðurin tað minni.

Eftir galdandi lóg skulu kommunurnar gjalda helvtina av hesum og landið hina helvtina, tó betalir landsstýrið í mesta lagi 500.000 krónur fyri hvørt búfólk.

Landsstýrið og samgongan ásanna tó, at Suðuroy er í eini serligari støðu við manglandi fíggjarorku hjá flestu kommununum til at fara undir slíka verkætlan.

– Tí er eru landsstýrið og samgongan sinnað til at finna eina serliga loysn, sum kann gera tað fíggjarliga møguligt at fara undir verkætlanina sum skjótast og fremja hana, siga Hans Pauli Strøm og Jógvan á Lakjuni.

Teir siga, at verður farið undir verkætlanina beinanvegin komandi ár, og røktarheimið verður bygt við Vágsvatn, har útgrivið er og planerað fyri miðnámsskúlan, kunnu samráðingar verða við kommunurnar í Suðuroy fyrst í komandi ári, so at heimið verður projekterað í vár ella tíðliga í summar og so kann farast undir sjálva byggingina næsta summar.

Sostatt kan heimið verða liðugt í apríl í 2007, sigur landsstýrið.



# Andras tikin á bóli

**Ungi og evnaríki trombonspælarin úr Havn, Andras Olsen fekk á lítlari samkomu, sum Konsertfelagið skipaði fyri, Volker I. Behrens legatið á 10.000 krónur. Andras helt bara, at hann skuldi spæla á samkomuni og grunaði als ikki, at tað snúði seg um eitt legat til hansara**

VIÐURKENNING

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Mánakvøldið fekk Andras Olsen Volker I. Behrens legatið áljóðandi 10.000 krónur. Hetta er eitt legat, sum Konsertfelagið letur ungum og evnaríkum tónleikarum. Tað er nú nakað síðani, at legatið varð latið seinast, men í sambandi við, at Konsertfelagið rundar tey 25 árini, varð gjørt av at gera nakað eyka burturúr.

Á einari samkomu í Listaskálanum mánakvøldið hevði Konsertfelagið heitt á Andras at spæla. Hann so gjørdi, og tá hann var liðugur fór hann út við trombonini. Tá hann kom innaftur og setti seg niður, fekk hann eitt brævi í hondina. Hetta sama brævið las Monica Stauss upp. Har stóð, at ein nevnd hevði gjørt av, at hann skuldi fáa Volker Behrens legatið.

– Eg visti av ongum. Trúði bara, at eg skuldi spæla til samkomuna og so onki meira, greiðir Andras frá í telefonini úr Keypmannahavn.

Hann er í ferð við at taka tað seinasta árið av sínari útbúgvin á Kongeliga Musikkonservatorium í Keypmannahavn.

### Til Amerika

Andras sigur, at hann bleiv øgiliga bilsin av viðurkenningini men sjálvandi ovurfegin. Hann hevur hugsað um at fara til USA at nema sær størri kunnleika innan blásiteknikk á einum skúla í antin New York ella Chicago.

– Har hava fleiri verið, og eg havi fingið at vita, at tey hava ein heilt serligan blásiteknikk har yviri, sum ein simpulten má royna, greiðir Andras frá.

Talan er um eitt uppihald í USA upp á umleið fýra vikur. Tað er kostnaðarmikið. Andras metir, at tað kosta einar 30.000 krónur.

– So hasar 10.000 krónurnar eru eitt gott ískoyti, tað er púra vist, sigur hann.



*Andras Olsen varð fullkomuliga tikin á bóli, tá hann fekk Volker I. Behrens legatið á 10.000 krónur. Hann fegnast um pengarnar og sigur, at teir koma væl við til eina ferð til USA at menna sítt trombonspæl, sum hann hevur ætlanir um at gera einaferð í framtíðini*

*Mynd: Jens K. Vang*

Nær Andras ætlar at fara til USA, veit hann ikki. Tað er nevniliga ikki so, at hann bara kann fara. Tað skal tilrættisleggjast nágreiniliga. Hann greiðir frá, at ein helst skal boða frá minst eitt hálvt ár frammanundan, so at nakrir tímar kunnu fastleggjast.

– Tað nyttar lítið at fara yvir har bara til einar tveir tímar. Tað skal helst vera einir tíggju, kundi eg hugsað mær, sigur Andras.

Men fyri fyrst er hann í ferð við at venja hart bæði í sambandi við sína útbúgving og í sambandi við ymsar konsertir, sum hann skal spæla til í onkrum av úrmælisbólkunum, sum hann spælir við í niðri.

Annars er Andras nógv heima í Føroyum og spælir. Bæði við Havnar Hornorkestri og Føroya Symfoniorkestri, har hann má sigast at hava slitið sínar barna- og ungdómsskógvar.

# Nýggi Varðin væl á veg

**Fyri umleið hálvum øðrum ári síðani kom fyrsti nýbygningurin á Viðareiði í sjeyti ár til Føroya. Tað var Gáshøvdi hjá Pf Kneysi. Um eitt hálvt ár kemur næsti nýbygningurin. Hesuferð er tað Varðin hjá PF Stíggjar - eisini á Viðareiði**

NýBYGNINGUR

*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*



*Fyri umleið tveimum vikum síðani varð nýggi Varðin hjá PF Stíggjar á Viðareiði flotaður á skipasmiðju í Gdansk. Báturin varð sleipaður til Hvide Sande í Danmark, har hann verður gjørdur liðugur*

Herfyri varð enn ein nýbygningur hjá viðoyingum flotaður á skipasmiðju í Gdansk. Báturin varð sleipaður til Hvide Sande í Danmark, har hann verður gjørdur liðugur. Tað er P/F Stíggjar á Viðareiði, sum byggir nýggjan trolara ístaðin fyri gamla Varðan.

Joen Jakke Heinesen av Viðareiði sigur, at sambært sáttmálanum skal nýggi Varðin verða liðugur tann 10. apríl.

– Men vit royna at skunda undir arbeiðið, tí 2. apríl lata jú tey stongdu toskaøkini uppaftur, og tá hevði verið gott at havt nýggja bátin, sigur hann.

### Tænt fyri sítt breyð

Joen Jakke greiðir frá, at avgerðin um at lata nýggjan Varða byggja varð tikin fyri umleið einum ári síðani.

– Varðin, sum vit sigla við nú, er væl og virðiliga útslitin, so hann hevur tænt fyri sítt breyð, heldur hann fyri.

Hvat fer at henda við gamla Varðanum, tá tann nýggi er liðugur, veit Joen Jakke tó ikki.

– Eg veit ikki, hvat er so lokkandi við einum gomlum træbáti við ongum fiskiloyvi. Eg kundi ímynda mær, at onkur kanska keypir motorin og so víðari, men nú fáa vit at síggja, sigur Joen Jakke og leggur afturat, at hann hevur fingið onkrar fyrispurningar, men onki ítøkiligt kortini.

Eisini vísir hann á, at tað ikki riggar líka væl at trola á landleiðini eftir flatfiski við einum gomlum træbáti. Tá heldur hann, at teir nýggjari trolbátarnir eru so nógv betur útgjørdi og egnaðir til tað endamálið.

– Flatfiskurin á landleiðini hevur verið tað berandi hjá okkum. Tann fiskiskapurin hevur verið javnt góður seinastu trý árini. Tá hevur toskurin heldur verið nakað svikaligur til tíðir, greiðir Joen Jakke frá.

– Hetta er kanska ikki tann heilt rætta tíðin til nýbygningar við høgum oljuprísum og svingandi fiskaprísum. Men rentan er í øllum førum lág, staðfestir Joen Jakke, sum tó kortini undirstrikar, at hann hevur gott mót.

### Góðar umstøður

Tað verða munandi betur arbeiðsumstøður umborð á nýggja Varðanum. Hann er innilokaður. Tað vil siga, at eitt dekk er omaná, og eitt niðriundir, har tað so verður arbeitt við fiskinum.

Nýggi Varðin er áleið somu støðd, sum teir báðir trolbátarnir, sum verða bygdir á Tórshavnar Skipasmiðju.

Skipið er góð 100 GT og lastar 500 kassar. Londin er 18,75m og breiddin er 6,20 m.

## Jólasølustevna 2004

Klaksvíkar Ítróttarfelag skipar í døgunum 26 - 28. november 2004 fyri "Árligu Jólasølustevnuni".

Sølustevnan í ár byrjar fríggjadagin 26. november klokkan 18.00, og leiðslubólkurin fyri stevnuna hevur avgjørt, at dagarnir verða uppbýttir soleiðis:
Fríggjadagur 26. nov kl 18.00 - 22.00 Serligur barna og ungdómsdagur
Leygardagur 27. nov kl. 16.00 - 21.30 Bert fyri vaksin. Veitsla verður kl 22.15
Sunnudagur 28. nov kl 16.00 - 21.30 Familjudagur.
Leygardagin er aldursmarkið 16 ár.

Hetta er gjørt soleiðis, fyri at tær luttakandi fyritøkurnar betri kunna gera seg til, at taka ímóti, og geva sær tíð til røttu viðskiftafólkini.

Um fyritøkur vilja verða við á Jólasølustevnuni 2004, so er at melda til beinanveg á telefon: 21 67 39 Nichels Lútzen ella 21 25 60 Finn Johannessen.

Seinasta freist at melda til, er leygardagin 13. november

Leygarkvøldið verður veitsla í Café KÍ. Prísurin er 250 kr fyri persón.

Eru serstøk ynski um ljós, ljóð, teknisk-an streym við meira so er bara at spyrja Nichels Lútzen um møguleikar og prísir.

## Politiskur fundur í Klaksvík

Sum siður er, skipar Klaksvíkar Húsmøðrafelag fyri politiskum fundi í Klaksvík, har øll kvinnuligu valevnini til kommunuvalið luttaka.

Fundurin verður hóskvøldið tann 4. novemberer klokkan 19. Fundurin fer fram á tann hátt, at fyrst sleppa øll tey kvinnuligu valevnini at leggja síni sjónarmið fram. Aftaná sleppa so áhoyrararnir at seta spurningar. Kjak millum valevnini ein og millum valevnini og áhoyrararnar verður eisini á skránni.

Áhugabólkurin hjá Klaksvíkar Húsmøðrafelag fór undir at skipa fyri hesum politisku fundunum fyri fleiri árum síðani, og hava teir víst seg at verið áhugaverdir og hava savnað nógv fólk.

**- sae –**